


www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 12 - 2011

# Oljutopparnir hittast í Qatar

Sunnudagin verður tann árliga ráðstevnan World Petroleum Congress sett í Qatar. Høvuðsevnini, sum teir umleið 5.000 luttakararnir úr 81 londum skulu viðgera, eru veðurlagið, oljuprísirnir, og hvussu vit gagnnýta orkuna best. Ein rúgva av fyrilestrum um alskyns spurnigar innan oljuvinnu verða á ráðstevnuni, og norska oljuvinnan er væl umboðað millum fyrilestrahaldararnar. Eitt nú skulu fimm umboð fyri Statoil og trý fyri Det Norske Veritas á røðarapallin. World Petroleum Congress verður hildin triðja hvørt ár og er tann størsta av sínum slagi innan olju- og gassídnaðin. Hetta er fyrstu ferð, at ráðstevnan er í Miðeystri.